# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stórir spurningar og lítið kjak

Nú er summartíðin gylta, er inngangurin til ein av vøkru sangunum, sum eru yrktir við í blástri frá hesi deiligu árstíðini.

Tað eru ikki so nógv ár síðani, at skeiðið millum Jóansøku og Ólavsøku í almenna rúminum kendist at vera steindeytt. Soleiðis er tað ikki longur. Ferðin er størri, og tíbetur fyri miðlarnar ber tað eisini hesa ársins tíðina til at fáa fatur á fólki, sum vil úttala seg, og sum hevur nakað upp á hjartað.

Næsta vikuskifti verður Ólavsøka, og harvið verður farið undir nýtt tingár. Tá fer løgmaður at bera sína seinastu ólavsøkurøðu fram í hesum valskeiðnum.

Løgtingsval verður í seinasta lagi leygardagin 19. januar 2008. Fyrireikingarnar til valstríðið eru í gongd, og hóast dentur fleiri ferðir hevur verið lagdur á, at tað skal arbeiðast seriøst fram til so stutt undan valinum, sum tað á nakran hátt ber til, so er eingin ivi um, at summarið, heystið og serliga veturin fara at verða lødd av valfepuri.

Í hesi vikuni hava fleiri spurningar, sum heilt víst fara at verða partur av valstríðnum, verið havdir á lofti. Nýggi fíggjarmálaráðharrin hevur spælt út við, hvussu hann heldur, at búskapurin skal temjast. Tað er ikki eins væl upptikið alla staðni, og landsstýrismaðurin hevur svarað aftur við at spyrja, hvat skal gerast, um tað ikki verður gjørt, sum hann sigur seg ætla.

Fiskidagaskipanin, friðingar, stovnsrøkt, veiðuroka og meiri, sum hevur við høvuðsvinnuna at gera, hevur verið frammi. Kommunal útjavning er komin aftur á breddan saman við kommunusamanleggingini, sum nú í fleiri ár hevur verið á politisku dagsskránni. Á Ólavsøku verður kirkjan yvirtikin, og tað er einki at ivast í, at etisku spurningarnir, sum fyrr í hesum valskeiðnum fyltu so nógv, fara at koma undan kavi aftur.

Føroyski presturin í Keypmannahavn fýltist í vikuni á, hví so nógv av lærdu og royndu fólkunum í Føroyum tiga og einki siga í almenna orðaskiftinum. Hann hevur grein í sínum máli. Tað hevði ríkað um samfelagskjakið og harvið verið gott viðspæl til politisku útmeldingarnar, um tað vóru fleiri enn skilagóði fyrrverandi fiskivinnustjórin, sum nú situr í London, sum góvu sítt íkast.

**Sosialurin**

## Fugloy og Svínoy

ANFINN LAKSÁFOSS

Ætla vit at varðveita okkara bygdamentan, so má okkurt henda skjótt. Tað hjálpir ikki at tosa um nakra bygdamenning, um ikki okkara útoyggjar fáa betri samferðsluviðurskifti. Tað ber ikki til at fáa nakran at fara út á eina útoyggj at byrja virksemi við tí sambandi, sum tær flestu útoyggjarnar hava í dag. Politikkarar úr øllum flokkum hava lovað til hvørt løgtingsval tey seinastu tíggju-fimtan árini, at eitt av teirra hjartamálum er at arbeiða fyri útoyggjunum??? Mongum brestir ætlan... Men ikki kann sigast, at útoyggjafólk hava sæð nakað til hjartasorg í teimum hjartamálum, sum lovaði vóru teimum.

At politikkarnir koma út á bygdirnar beint upp undir eitt løgtingsval og lova teimun gull og grønar skógir er bert at koyra salt í sárið á teimun fólkum, sum enn trúgva uppá, at tað ber til.

Eg havi t.d. spurt í innlendis- og vinnumálaráðnum, hvussu langt teir eru komnir við samferðsluviðurskiftunum út á Fugloynna og Svínoynna, og hvørjar ætlanir eru fyri oyggjanar báðar. Svarið var, at ongar ítøkiligar ætlanir enn eru komnar á borðið, um hvussu tað skal skal gerast.

Kalsoyggin er ein fyrimynd fyri, hvussu nógv tað hevur at siga, at sambandið er í lagi. Ein tunnil millum Svínoynna og Fugloynna hevði kostað minni enn tunnlarnir, ið bindað bygdirnar á Kalsoynni saman, um teir skuldi verið gjørdir í dag. Ein ferjulega yviri í Havn hevði eisini loyst sama trupulleikan við sambandinum til báðar oyggjarnar, sum ferjulegan á Syðradali loysti, tá kalsoyingar fingu eina bilferju ístaðin fyri Barskor. Kalsoyggin er í so máta bjargað, tá tað kemur til fólkafráflyting, men ikki ganga nógv ár, áðrenn Fugloyggin og Svínoyggin bert hava toftir av húsum og spor eftir fólki, sum einaferð hava búleikast á plássinum báðum, um ikki okkurt verður gjørt nú. Hetta er ikki nakað, sum kann bíða longur eftir einari raðfesting, tað má okkurt vera gjørt nú, um fólk og vinna skal trívast á oyggjunum báðum. Svínoyggin hevur stórt upplendi, har nógvar vinnir kundu havt teirra virksemi á. Eisini við øllum grótinum úr einum tunli til eitt grótkast, kundi Svínoyarbygd verið ein tann best plaseraða útróðrarbygdin í Føroyum.

Til síðst ein áheitan til fugloyingar og svínoyingar um at leggja alt tað sum okkara politikkarar her norði hava lovað og síðani virka fyri til trivna at búleikast á Fugloynni og Svínoynni saman. Um lyftini til fugloyingar og svínoyingar skuldu verið løgd saman, høvdu tey óivað verið reyð í botnlinjuni.

## Brunakrøvini í Gamla Realskúlanum eru enn ikki uppfylt

MEINAR ORTIND

Nógv kjak hevur verið um, at Gamli Realskúlin er ein brandfella, og tí kann hann ikki brúkast til undirvísing. Loysnin er at fyrisitingin í Tórshavnar Kommunuskúla skal inn í bygningin og at smekka nakrar gipsplátir á partar av veggjunum. Tá Gamli Realskúlin verður liðugur eftir ætlan, lýkur hann enn ikki galdandi brunakrøvum.

Arbeiðsfólkið, ið arbeiðir við at umvæla gamla realskúlan, hava ongar tekningar at arbeiða eftir. Teir arbeiða í hvør sínum lagi, uttan sjónliga heildarætlan. Timburmenninir leggja gipsplátur á veggin, men tann niðasti 1,10 meturin verður einki koyrt uppá, tí har er ein útskering.

Hegin Mortensen vil so fegin hava, at alt tað gamla, skal vera í upprunastandi og síggjast.

Úrslitið er, at bygningurin nú er ein størri brandfella enn áður, tí nú halda fólk, at bygningurin er tryggur aftan á gjørdu umvæling.

Teir gomlu berandi miðveggirnir eru 12 cm breiðir, og samansettir av einum bjálka upp á átta cm og við tveimum cm tjúkkum brettum á hvørjari síðu. Hesin veggurin er ein av trimum berandi konstruktiónum saman við útveggjunum.

Ein tílíkur veggur, sum miðveggurin, ið er klæddur við einum lagi av gipsplátu, kann góðkennast til BD-60 vegg.

Í KBB-99, ið er galdandi kunngerð um brunaverju og brunatrygd, stendur greitt í § 7.2-5 “Bygningur, sum er meiri enn 1 hædd, og har ovasta gólvið er ikki hægri enn 12 m oman fyri lægsta jørðildi, skal hava berandi konstruktiónir og skilagólv til og við gólvið í ovastu hædd, í minsta lagi sum BS-húsalutur 60. “

Tað vera ikki gjørd frávik til § 7.2-5 í KBB-99

Munurin á BD og BS veggi er, at ein BS veggur skal ikki vera bygdur burtur úr nøkrum brennandi tilfari, meðan BD veggur kann vera bygdur úr brennandi tilfari.

Eg eri samdur við Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóra í Tórshavnar Kommunu, í, at um gamli realskúlin skal brúkast til undirvísing aftur, so má bygningurin rívast niður allur sum hann er, áðrenn hann kann brúkast til skúlastovur. (tikið úr grein á olivant, tann 20 juni 07 )

Gamli Realskúlin má eisini rívast niður og byggjast uppaftur fyri at vera nýttur sum fyrisitingarbygning, tí tað eru somu krøv galdandi til bygning ið skal nýtast til skrivstovu ella undirvísing, sí KBB-99.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.